tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 232 Leygardagur 2. desember 1995 69. árgangur Krónur 7,00



# Bjørn ikki ánilsi av hvat hann tosar um

Uppskotið hjá Bjørn á Heygum um at leggja annað av okkara skipum er als ikki nøkur sparing. Og vit seta trygdina hjá fiskimonnum á álvarsligan vanda, gera vit tað, sigur Jóan Karl Høgnesen á Vaktar & Bjargingartænastuni Síða 6

*Ungdómurin stendur saman um kravið:*

# MTV aftur á skíggjan




Eini 400 lívlig ungfólk úr høvuðsstaðarøkinum gingu hósdagin kravgongu fyri at fáa MTV aftur á skránna hjá Rás Tórshavn Síða 5

# Skálaðu fyri Lopransholinum



*18 oljufeløg hava játtað at fíggja nýggja boring í Lopra* Síða 3

# Øll hava rætt at liva eftir síni sannføring



»Eg eri føroyingur, og kenni ábyrgd mótvegis Føroyum. Tað er orsøkin til, at eg standi fram og royni at bøta um viðurskifti teirra samkyntu her á landi«, sigur Bogi Davidsen Síða 17

# Grønt ljós fyri Lopransholi

*Flest øll av teimum stóru altjóða oljufeløgunum, sum arbeiða vestan fyri Hetland, hava játtað at vera við til at gjalda fyri eini nýggjari boring í Lopra. Føroyar skulu ikki gjalda.*

Tilsamans 18 altjóða oljufeløg hava [illegible] frá, at tey eru sinnað til at vera við til at fíggja eina nýggja boring í Lopra.

Eri eri sera fegin um hesa stóru undirtøku. Vit skulu hava fund við feløgini 11. desember at greiða nakrar spurningar, men eg rokni við, at alt fer at koma uppá pláss sigur ein væl nøgdur Arne Rosenkrands Larsen á Dopas í Danmark, sum stendur fyri verkætlanini.

Hesin ovurstóri áhugi fyri at vera við í eini Lopra-boring verður millum oljufólk mettur at vera eitt tekin um, at altjóða oljufeløgini seta stórar vónir til Føroyar sum eitt komandi oljuøki.

Herfyri vóru umleið fyri 22 oljufeløg í Føroyum og kunnaðu seg um projektið. At tað nú eru heili 18 feløg, sum vilja leggja út tilsamans 30 mill. kr. til eitt slíkt projekt er dømi um, hvussu Føroyar verða prioriteraðar sum komandi oljuøki.

Sosialurin hevur skilt, at so gott sum øll tey stóru oljufeløgini, sum arbeiða vestan fyri Hetland eru við í projektinum, og hetta kann neyvan verða betur fyri útviklingin á føroyska økinum.

Føroyar koma sum so einki at gjalda til hetta projektið annað enn, at oljufyrisiting fer at brúka væl av orku til at vera við í víðari fyrireikingini av projektinum saman við Dopas og DGU.

Byrjað verður at borað í mai næsta ár. Borað verður í góðan mánað, og fer hetta eisini at geva væl av arbeiði og virksemi serstakliga í Suðuroynni. **jan**



*Tey skáladu í Lopra, tá umboð fyri 22 oljufeløg vitjaðu har. Skálað varð fyri nýggja projektinum, sum nú verður veruleiki. Her er eitt av umboðunum í ferð við at smakka sær á. Mynd jan*

**Blindastovnur Føroya**
hevur opið mánadag–fríggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288.

# Fer fegin til Hvalbiar

*- Vit hava alla tíðina ætlað okkum aftur til Føroya, sigur Andreas Andreasen, sum í morgin verður prestvígdur í Havnar kirkju, og 17. desember verður innsettur í Hvalbiar kirkju*

Tað er ein ungur og nýggjur prestur, sum nú tekur við í Hvalba.

Andreas Andreasen er 33 ára gamal og ættaður av Tóttum.

Hann læs fyrst tvey ár á guðfrøðideildini á Fróðskaparsetrinum og fór síðan til Keypmannahavnar, har hann tók prógv í fjør.

Síðan hevur hann einki arbeiði havt. Arbeiðsloysi er millum prestar í Danmark.

Nú nøkur størv vórðu lýst leys í Føroyum, søkti Andreas.

- Vit eru bæði føroyingar, og vit hava alla tíðina ætlað okkum aftur til Føroya, sigur Andreas.

Hann er giftur við Jórun Klein, sum er úr Havn. Hon er útbúgvin "ernæringsøkonom".

Tey fluttu heim fyri nøkrum døgum síðan, og í næstu viku ætla tey eitt rend suður, men tey flyta ikki beinanvegin inn í prestagarðin í Leirum. Andreas skal ikki innsetast sum prestur í Hvalbiar kirkju fyrr enn sunnudagin 17. desember.

Í morgin verður hann prestvígdur í Havnar kirkju.

Andreas sigur, at tey gleða seg bæði til at flyta til Hvalbiar, og hann ivast ikki í, at hann fer at trívast har. Tey hava [illegible]

Andreas [illegible]

randi



[illegible] Mynd Kalmar

JÓLAKORT



Kom inn og fá tikið eina fitta mynd í hugnaligum jólaumhvørvi
10 jólakort við brævbjálva. Við fotografering 119:-
10 fylgjandi........................79:-

Fotografering:
Vanligar dagar............ kl 10.00 - 17.00
Leygardagar................ kl 10.00 - 13.00

10 jólakort eftir egnum negativi.............. 79:-
SMS FOTO
Tlf. 19820 sjálvandi!

LEIGA • LEIGA • LEIGA

Zanussi vaskimaskina ZF 800 I
- 14 føst programm
- 1/2 fylling og orkusparing
- Sentrifugering 800 snúr/min
- Trumla 42 ltr og hitalíkam úr rustfríum stáli
- Vaskikar úr Carboran sum ikki tærist
- Umhvørvisvinarlig vaskiskipan ið brúkar sápuna 100%
- Tekur 4,2 kg
- Mát H85xB60x D52,5 cm




Leiga um mán. 275:-
ELDING